

Tit ringja — vit skriva

Er nakað á vási? — Ivamál?
Ein spurningur, ella tíðindi, so ring til okkara.
Vit eru til reiðar!
Telefon 11820 · Telefax 14720



tíðindablaðið **sosialurin**




Lýsingar

Lýsingarfólk okkara er ráðgevari hjá fyritøkum og einstaklingum í lýsingarspurningum. Hetta verður gjørt uttan meirkostnað fyri lýsaran
Telefon 11820 · Telefax 14720

veðrið

Kalda hátrýstið yvir Skandinaviu og Eysturevropu stendur mestsum í stað næstu dagarnar og mennist. Lágtrýstið sunnanfyri Ísland rekur norðuryvir. Tilhoyrandi brúgvaløg við regni reka vestaneftir yvir Føroyar í dag. Hátrýstið elvir síðani aftur til køliø luftrák av landssynningi.

Fríggjadagin:



Friskt lot upp í hvassan vind, 10–15 m/s, av suðri, ádrigið, toluligt sýni at byrja við, men út á dagin regn vestaneftir og vánaligari sýni. Hitin millum 3 og 6 stig. Leygarnáttina støkkur hann vesturum í útsynning, mestsum turt og gott sýni.

Leygardagin og sunnudagin:

Lot upp í hvassan vind, eingir m/s, av suðri og landssynningi, lutvíst ádrigið, turt og gott sýni. Hitin millum 3 og 5 stig.

Mánadagin og týsdagin:

Einamest millum gul og strúk í vindi, 8–13 m/s, av landssynningi, lutvíst ádrigið, kanska hendinga æl, men annars gott sýni. Hitin millum 1 og 4 stig.



Tað krevur tíð og tolsemi hjá børnum at luttaka í slíkum, sum tá ein sjónvarpssending skal gerast. Her tosar Martin Andreas (í mynstrutari troyggju) við børn, sum tekna til eina framsýning í Listasavninum. Vinstrumegin siggjast: starvsfólkini í SvF: Mikkjal Øster, Birita Weihe og Annika Marr Poulsen

Mynd: Kalmar

Í Barnaløtuni fríggjadagin kl. 19:

Um hvussu eitt blað verður gjørt

- Børn eru von við at síggja bløðini, men tey vita ikki, hvussu eitt blað verður gjørt. Tað fara vit at siga teimum í Barnaløtuni fríggjadagin, sigur Birita Weihe, sum hevur lagt sendingina til rættis

Tað eru nógvir lutir í gerandisdegnum, sum tilkomin taka sum eina sjálvfylgju, men sum børn ikki hava møguleika at skilja.

Heilt einfaldir lutir kunnu fyri børnum vera ørkymlandi, tí tey ikki hava hóming av, hvar og hvussu hesir lutir eru gjørdir.

Barnaløtan hevur tikið eitt av slíkum evnum upp, og fer at siga børnum hvussu eitt blað verður gjørt. Í hesum sambandi vitjaði SvF Sosialin mikudagin.

Í myndum verður greitt frá, hvussu Sosialurin verður gjørdur, frá tí at blaðfólkið tosar um, hvørji tíðindi og onnur evni eru at skriva um, og hvussu innihaldið skal skipast, júst tann dagin, ein smádrongur skuldi royna seta seg inn í hesi viðurskifti.

Fyri at gera tilfarið lættari hjá børnum at skilja, er níggju ára gamli Martin Andreas Kruse við í sendingini. Hann roynir seg sum blaðmaður henda dagin.

Martin Andreas Kruse velur at fara niðan í Listasavnið, har skúlabørn í løtuni tekna til eina framsýning.

Eitt sjónvarðslið fylgir Martin Andreasi á Sosialinum, fer við honum á Listasavninum og annars til blaðið er liðugt til prentingar. Martin Andreas er eisini við á prentsmiðjuni, so hann kann fáa eitt eintak av Sosialinum.

Birita Weihe, sum hevur lagt sendingina til rættis sigur, at tað var áhugavert at gera hesa sending.

-Vit gera sendingina einfalda, so børnini skulu skilja innihaldið. Nógvar myndir eru, sum tala fyri seg soleiðis, at børnini kunnu fáa eina hóming av, hvussu eitt blað verður gjørt.

- Hví just vitja blaðhús sum arbeiðspláss. Kundu børnini ikki havt størri áhuga at síggja, hvussu arbeitt verður t.d. á einum bakarí?

- Eg havi leingi havt ætlanir um at gera sending fyri børnum, um eitt arbeiðspláss, sum í innihaldi skuldi vera um børn og fyri børnum.

- Hugskotið fingu vit, tá tað frættist, at børn teknaðu í Listasavninum. Við at flætta blaðarbeiði og tíðindi fyri børnum saman, tóku vit Sosialin upp í hetta, eins og fyri at gera innihaldið meira livandi.

Hetta varð gjørt út frá tí, at flestu børn kenna bløðini, men bert fá munnu vita, hvussu bløð verða gjørd, sigur Birita Weihe.

Dagny

KFUM og KFUK Tórshavn

Í dag kl. 19.00–24.00 í *KFUM:* Opið hús.

KFUK, Vágur

hevur møti í kvøld kl. 19.30 í Meinigheitshúsinum.

AA-fundur

verður í Havn í kvøld kl. 20.00 á Vaskarínum, Tórsgøtu 5 (inngongd vestanfyri), og kl. 22.30 í Uppistovu, C. Pløyensgøtu 17.

Sjálvhjálparbólkar

Kvinnuhúsið skipar regluliga fyri sjálvhjálparbólkum. Evnini kunnu vera ymisk, men hugsanin er at savna kvinnur við einsháttaðum trupulleikum, so tær fáa høvi til at hjálpa og stuðla hvørji aðrari. Vilt tú vita meira, so ring á tlf. 17200 seinnapart gerandisdagar millum klokkan hálvgum trý og hálvgum fimm.

Vestfalskyrrindi

10. februar: Tendring
16. februar: Mánin longst frá jørðini
18. februar: Fyrra kvarter

Dato	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	Haraldssundi/Leirvíksfirði fp.	sp.	Skúvoyarfirði/Skopunarfirði fp.	sp	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.
18. febr.	–	1204	0138	1404	1019	2301	–	1219	1104	2346	1119	–
19. febr.	0046	1322	0246	1522	1137	–	0101	1337	–	1222	0001	1237